Álit

í

løgtingsmáli nr. 58/2023: Uppskot til løgtingslóg um Brekumboð

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 18. januar 2024, og eftir 1. viðgerð tann 23. januar 2024 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 15. og 22. februar 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við MEGD, Kommunufelagið, Løgtingsins umboðsmann, Føroya Kærustovn, Orðblindalærarafelagið og landsstýriskvinnuna í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Brekumboðið skal hava eftirlit við, at innlendis lóggáva, tænastur og tilboð eru í samsvari við ST sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

Umboðið skal veita ráð og vegleiðing til fólk, ið bera brek, um teirra rættindi, kærumøguleikar og klagumøguleikar.

Eisini skal Brekumboðið veita ráð og vegleiðing til almennar myndugleikar, almennar og privatar stovnar og fyritøkur, fakfeløg og áhugafeløg um spurningar viðvíkjandi rættindum, kærumøguleikum og klagumøguleikum hjá fólki, ið bera brek.

Eisini skal veitast kunning og frálæru við tí endamáli at ala fram virðing fyri rættindum hjá fólki, ið bera brek.

Brekumboðið skal gera frágreiðingar og kanningar um viðurskifti hjá fólki, ið bera brek.

Brekumboðið verður eitt talsfólk fyri fólk, ið bera brek, og skal gera rødd teirra týðiligari í almenna rúminum og birta kjak um viðkomandi spurningar, sum viðvíðkja rættindum hjá fólki, ið bera brek.

Brekumboðið er óheft í virki sínum og kann frítt úttala seg um viðurskifti innan tess virkisøki, men kann bert úttala seg um yvirskipað viðurskifti, og ikki um viðurskifti hjá einstaklingum.

Brekumboðið kann bert úttala seg og kann ikki taka avgerðir.

Vit hava alt ov nógvar smáar stovnar í Føroyum. Størri eindir vildu bæði fíggjarliga og fakliga verið ein fyrimunur. Trivnaðarnevndin tekur undir við landsstýrinum, at Brekumboðið ikki verður ein sjálvstøðug fyrisitingarlig eind, men verður lagt saman við øðrum.

Við hesum viðmerkingum tekur Trivnaðarnevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 28. februar 2024

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstforkvinna	Kaj Leo Holm Johannesen
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	